# Pólland – eldorado fyri mentan



Póllendingar hava seinnu árini ferðast nógv vestur um at arbeiða. Eisini í Føroyum kenna vit hesi arbeiðssomu og álítandi fólkini, sum smíða skip, eru læknar ella íðka ítrótt. Møguleikarnir eru eisini stórir at ferðast til Pólland, sum hevur fingið eitt gott umdømi sum ferðamannaland.

Pólland kann bjóða alt frá strondum og fjøllum til mentan og skíferiur. Ikki minst fyri tey, ið hava áhuga fyri mentan, er Pólland eitt satt eldorado.

Ætlar tú tær at halda eina aktiva feriu, so er bara at seta kósina ímóti Póllandi, og ert tú av álvara djørv ella djarvur, ber til at klatra í fjøllunum har suðuri í landinum. Men tú kanst eisini velja at slappa av og njóta mongu mentanarligu attraktiónirnar.




















